## Holst spældi javnt

Fyrsta umfar í ársins útgávu av donsku landskappingini varð leikt í gjár. Einasti føroyingurin í donsku kappingini, Christian Holst, var á vøllinum fyri Silkeborg, sum spældi javnt á útivølli móti HB Køge. Føroyski landsliðsframherjin var útskiftir miðskeiðis í seinna hálvleiki. Hann og liðfelagin Rajko Lekic rendu saman, og Holst fekk ein snudd í høvdið. Úrslitini í SAS-liguni vóru hesi: FC Nordsjælland – FC København 2-0, FC Midtjylland – Esbjerg fB 0-0, Sønderjyske – Randers 1-0, HB Køge – Silkeborg 1-1 og Brøndby – OB 2-2.



## Hoyvíkingur á Ólavsøku

10-mannafarið hjá Hoyvíkingum fer at rógva kapp á ólavsøku. Tað skrivar heimasíðan hjá Kringvarpinum. Magnus Madsen og Martin Dahl hava saman við Stefan Mølvig tikið stig til at manna bátin. Eydnaðst tað Hoyvíkingi at vinna á ólvasøku, fær báturin einki stig. Tað er krav, at ein bátur skal luttaka á trimum øðrum FM-stevnum, um stig skal verða givið.

# B71 er á veg uppeftir




**Við trivaligum 3-0 sigri á Sevmýri tryggjaðu sandoyingar sær fremsta plássið í næstbestu deildini**

1. DEILD

*Jóannes Hansen*

Nú tað resta tólv umfør, eru tað sandoyingar, sum liggja best fyri í kappingini um at flyta upp úr 1. deild. Leygardagin vitjaði B71 á Sevmýri. Um tað hevði eydnast heimaliðnum at vunnið, so hevði TB verið rættuliga væl við í kappingini um fremsta plássið.

Men TB hevði ikki so nógv at bjóða uppá. Ebbe Kristin Thomsen skoraði tvey mál fyri B71 eftir lítlari løtu, tá ið ein hálvur tími var farin, og so var spurningurin bara, hvussu stórur B71 sigurin skuldi verða. 3-0 málið varð skorað í yvirtíðini.

tóra samrøðuevnið hetta vikuskiftið var, at HB ikki møtti upp á Vágseiði. HB var undan hesum umfarinum topplið. VB/Sumba vinnur øll stigini. HB boðaði fríggjadagin VB/Sumba frá, at tað ikki bar til at manna liðið hesa ferð. Leygarkvøldið harmaðist felagið um støðuna. Um hetta fer at fáa aðrar avleiðingar fyri HB er ikki greitt enn.

Hjá FC Hoyvík hilnaðist ikki væl fimm tey síðstu umførini undan summarsteðginum. Hesa ferð eydnaðists tað at vinna øll stigini ímóti B68. Sigursmálið til 3-2 varð skorað í síðstu løtu.

Víkingur vann 3-1 á NSÍ. Talan mundi vera um met, tá ið víkingarnir skoraðu fyrsta málið. Tá vóru sjey sekund farin!

Í fjúrtan teimum fyrstu umførunum eydnaðist tað ikki MB at vinna. Leygardagin eydnaðist tað at vinna bornuppgerðina á Skála 1-0. Einsamalla málið skoraði Jógvan Joensen, tá ið tað restaðu tíggju minuttir.

At Víkingur vann á NSÍ, og at Skála tapti ímóti MB ber við sær, at tað verður ógvuliga torført hjá Skála at varðveita plássið í deildini.

### 1.deild

VB/Sumba-HB avlýstur
VB/Sumba uttan dyst

Víkingur-NSÍ 3-1 (2-0)
1-0: Bárður Hansen 1.
2-0: Bárður Hansen 40.
3-0: Kaj Leo í Bartalsstovu 75.
3-1: sjálvmál 82.

TB-B71 0-3 (0-1)
0-1: Ebbe Kristin Thomsen 29.
0-2: Ebbe Kristin Thomsen 32.
0-3: Høgni Warberg 90.

FC Hoyvík – B68 3-2 (2-1)
1-0: Jørgen Meitilberg
2-0: Mortan Joensen
2-1: Bogi Gregersen
2-2: Bogi Gregersen
3-2: Uni Holm Johannesen

Skála-MB 0-1 (0-0)
0-1: Jógvan Joensen

### Stórtap í Íslandi

Fyrri vinardysturin á íslandsferðini hjá U-15 gentunum endaði leygardagin við 7-0 tapi

Føroysku U-15 genturnar í fótbólti løgdu leygardagin rygg til stórtap í Íslandi. Úrslitið var 7-0, eftir at hálvleiksstøðan hevði verið 2-0. Tvey tey fyrstu málini vórðu skorað í 1. og 3. minutti, og triðja málið varð skorað, tá ið ein tími var farin.

Klokkan 17 í dag spæla Føroyar og Ísland aftur U-15 kvinnulandsdyst.

Føroyska liðið leygardagin: 1. Bjarta Johansen HB – 2. Elin Kruse EB/Streymur, 5. Gunnrið Joensen KÍ, 3. Sólja Eiðisgarð EB/Streymur, 17. Súsanna Norðgerð, VÍKINGUR (13. Rakul Johannesen, B36, 60.) - 6. Una Joensen KÍ (8. Amanda K. Olsen, HB, 57.), 10. Íðunn Magnussen EB/Str, 11. Ansy Sevdal B68/NSÍ, liðformaður, 7. Elin Maria Isaksen, 07 VESTUR/ MB (12. Birma Tummasardóttir, SKÁLA, 57.) – 9. Ásleyg Súnadóttir AB (14. Annika Petersen, ÍF, 72.), 15. Ragna í Lambanum ÍF.

Á bonkinumum uttan at verða skiftar inn:

4. Sandra Jonsen AB, 16. Palma Ryggshamar Víkingur, 18. Lovisa Østerø KÍ

*mørk*

## Bestubitar úr sms-kappingini í Triðja Hálvleiki

Fjepparafelagi hja ki broytt navn til tann blaa dynan

Hetta er nýggi 07vestur sangurin. Vágamenn eru jú tiltiknir fyri teirra elevatorlið. Lagið er "busta tenn": upp og niður, aftur og framm, alt í senn, tað sigur Hegga Samuelsen!

Jens erik vann veddimáli, sum hann gjørdi saman við maldini. Fyri 30 árum sídani veddaðu teir um, hvør kláraði at halda á longst. Og man má siga, at jens erik er still going strong

Um ki skal koma upp ur botninum mugu teir faa sær atlantic airwais til sponsor heilsan ein b68ari

Vit taka imoti øllum ti sum NSI ikki far brukt. 2 teir bestu leikanir a vøllinum i dag, voru NSI-ara. Andy og Øssur